## Fyrsta gassrikna farmaskipið

Norska reiðaríið Sea-Cargo hevur bílagt tvey ro-ro farmaskip. Bæði skipini, sum skulu byggjast á Bharati skipasmiðjuni í Indiu, verða eftir ætlan latin í 2010. Tað er norska dótturfelagið hjá Rolls-Royce Marines, sum hevur staðið fyri menningini og eisini skal standa fyri framleiðsluni av maskinunum. Flótandi gass skal goymast í tveimum stórum tangum í einum rúmi framman fyri maskinrúmið, skrivar heimasíðan 123.fo. Skipini, sum eru 132,8 metrar long og stinga seks metrar, lastað um 5.600 tons á 1140 raðmetrum (lanemeter). Eisini hava tey 50 tons bingjukrana. Reiðaríið hevur eisini bílagt tvey onnur líknandi skip frá indiskari skipasmiðju, men hesi skulu hava vanliga maskinu.

## Framtíðar vinnumøguleikar í Norðuratlantshavi

North Atlantic Economic Forum, sum verður hildin í Reykjavík í næsta mánaði, er altjóða ráðstevna um framtíðar vinnumøguleikar í Norðuratlantshavi. Evnið er sera aktuelt nú tað brýtur um bæði borð í fíggjarkervum heimsins, og matvøru og oljuprísir trýsta. Hvørjum skulu vit liva av í framtíðini og hvussu ávirka hesi rák okkum? Veðurlagsbroytingar, orkukeldur og náttúruríkidømi hava sett Norðuratlantshavið og Arktiska økið á altjóða breddan. Føroyar, Ísland og Grønland liggja mitt í hesum øki og kunnu vit við samstarvi standa munandi sterkari. Norðuratlantiska og Arktiska økið uppliva í hesum árum umfatandi veðurlagsbroytingar, og mett verður at komandi tíggju árini fara at hava stórar broytingar við sær á landafrøðina, vistfrøðisskipanina og á sosiala og búskaparligar bygnaðin. Hetta fer helst at ávirka týðandi vinnugeirar Norðuratlantsøkinum, so sum oljuvinnu, námsvinnu, flutningsvinnu, fiskivinnu og ferðavinnu. Endamálið við ráðstevnuni er at finna nýggjar vinnumøguleikar, sum hesar broytingar geva okkum. Sostatt verður hugt eftir fyrimununum heldur enn vansunum, orsakaðir av veðurlagsbroytingunum.

# forðar ikki grannum at hittast

fríggjadag og koma aftur mánadag fyri góðar 2.630 føroyskar krónur. Í hesum tilboðnum er eisini gisting á trístjarnaða hotellinum Frón, sum liggur mitt í býnum.

Tíverri fyri íslendingar er krónan metlág í løtuni, men fyri tann vitjandi og keypshugaða føroyingin – mann ella kvinnu – ber snøgt sagt til at gera kvetti.

Tað er henda veruleikan, sum flogfelagið vísir á, og sum felagið vónar, at fleiri fara at taka við.

### Ódýrt ferðamál

Í farnu viku vóru umboð fyri Atlantsflog í Íslandi í sambandi við eitt átak at vísa íslendingum á ferðamøguleikar í Føroyum. Átakið var hesaferð gjørt saman við SamVit og umboð fyri tíðindatænastuna.

Umframt stjóran, Magna Arge var Henny á Líknagøtu við í ferðalagnum. Og fyri hana er eingin ivi um, at her eru góðir møguleikar at fáa fleiri ferðafólk við flogførum teirra báðar vegir.

Atlantsflog hevur áður havt líknandi ferðatilboð til føroyingar. Tí, sum Henny á Líknagøtu sigur: - Ísland hevur altíð verið áhugavert ferðamál hjá føroyingum og er tað enn.

- Fyrimunurin við Íslands-rutuni er hann, at tað er ódýrari at flúgva higar, tí teinurin er so stuttur. Og krónan er haraftrat eisini metlág!

Hetta er ikki fyrsta átakið í Íslandi, og neyvan tað seinasta heldur.

### Kærkomið høvi

Ein partur av átakinum í Íslandi var ein móttøka á føroysku sendistovuni hósdagin í farnu viku.

Ætlanin hjá felagnum var at sláa eitt rættiligt slag fyri hesi flogrutuni mótvegis fólki innan íslendsku ferðavinnuna og politiska myndugleikan í landinum.

Men trupla búskaparliga støðan har gjørdi tíverri sítt til, at bert umboð fyri ferðavinnuna høvdu møguleika at verða við. Og fyri var hetta eitt kærkomið høvi at vísa sínum landsmonnum á møguleikarnar fyri at ferðast í Føroyum.

Um ikki so langa tíð fer Atlantsflog at lýsa við serstøkum jólatúrum, umframt ta tilboðið sum nú er galdandi fram til hálvan desember.



*Íslendski høvuðsstaðurin hevur nógv at bjóða tí vitjandi, bæði tá talan er um undirhald, handlar og forkunnug støð*



*Fleiri íslendingar vilja til Føroyar einaferð í lívinum. Nú er ein ódýrur flogmøguleiki til tess*